*Í Europa prædika vit næstrakærleika í okkara Gudshúsum. Summi gera tað fríggjadag, onnur leygardag og uppaftur onnur sunnudag. Spurningur mín er: " Hvat gera vit øll mánadag?".*

*Bent Melchior, rabbinari í Danmnark*

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV@
SOSIALURIN.FO
TLF 341800

TÍÐINDI

# Søluframsýning í Norðurlandahúsinum

**Í dag letur Norðurlandahúsið upp eina søluframsýning við føroyskum listhandverki. Tað eru fýra listafólk, sum saman við handlinum Listir luttaka á framsýningini**

HANDVERK
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Norðurlandahúsið hevur tikið stig til søluframsýningina fyri at stuðla føroyskum listhandverki.

Framsýningin er breið, og handverk innan millum annað ull, træ, seyðahorn, silvur og glas verða víst fram.

Àrna Helmsdal hevur eina áhugaverda kreatión, har hon hevur brúkt sniðið í føroyska kvinnubúnanum men brúkt annað tilfar og aðrar litir enn vit eru von við.

– Árna tekur støðu í tí siðbundna, men ger nakað øðrvísi burturúr tí, sigur maður hennara Mikkjal Helmsdal.

Føroyski búnin, ið Árna hevur gjørt er limegrønur, og silvurið er skift út við sergjørdar hornsmúkkur.

### Føroysk bindingarmynstrum

Katrin Andreasen hevur skapað sera vakrar silvurringar, sum eru útskornir og sniðgivnir eftir gomlum føroyskum bindingarmynstrum.

Onnur luttakandi eru Ole Jacob Nielsen, trælistarmaður, Guðrið Poulsen, keramikari, og Svanhild Christiansen, ið ger keramiskar figurar av náttúrumotivum.

Eini 10 veitararnar til handilin Listir luttaka í framsýningini, haðani eru Rasmus Nygaard, ið ger smúkkur úr horni og beini, Guðrun Elttør, ið ger pløgg úr silki og bundnari og tøvdari ull, Unn Eldevig Petersen, ið ger húgvur og taskur úr tøvdari ull, Durita Dam, ið ger heklaðar taskur og Árna Helmsdal, ið sniðgevur og seymar pløgg úr bundnum ullartoyi.

Søluframsýningin verður standandi alt summarið í Norðurlandahúsinum.







*Nakað av tí, sum verður víst fram í Norðurlandahúsinum*





Handilslærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan sølu av tilfari til hitaverk, sanitet, ventilatión, baðirúmsútbúnað og líknandi, hava vit eitt lærupláss leyst at søkja.

Tú kemur at fáast við øll øki í søluliðnum í fyritøkuni, eitt nú innkeypi, goymsluarbeiði, avgreiðslu og vegleiðing av kundum og útrokning av tilboðum við meira.

Arbeiðstíðin er frá kl. 8 til 17.

Eftir lokna lærutíð eru góðir møguleikar fyri framhaldandi arbeiði hjá okkum. Útbúgvingin gevur eisini góðar møguleikar fyri at útbúgva seg víðari á mongum økjum.

Hevur tú FHS er lærutíðin 3 ár, og hevur tú HH er lærutíðin 2 ár.

Nærri upplýsingar um lærupláss fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Anniku Krosstein.

Hevur hetta tín áhuga, so send okkum eina umsókn saman við prógvum og viðmælum. Umsóknarfreistin er 30. juni 2006.

P/F Svend Krosstein
Falkavegur 6
Postboks 3229
FO 100 Tórhavn
Tel. 34 46 00

sansir.fo